## DAGSINS MEINING

# Eitt áhugavert valúrslit

Kommunuvalið í Danmark gav eitt sera áhugavert úrslit, og man valið veruliga hava givið politisku flokkunum nakað at hugsa um. Sosialdemokratarnir gjørdust størsti flokkur á danska kommunuvalinum í gjár. Sum væntað fingu Sosialdemokratarnir yvirborgarstjóran í Keypmannahavn, har Ritt Bjerregaard var tann stóri sigursharrin. Harafturat eydnaðist tað flokkinum at vinna borgarstjórasessin í Århus aftur, eftir at Vinstri hevur havt hann seinastu árini. Eisini í Aalborg heldur sosialdemokratiski borgarstjórin fram, og í Vejle og Horsens eiga Sosialdemokratarnir nú borgarstjóran. Ein smeitur var tað tó, at flokkurin misti borgarstjóran í Odense, sum fór til Konservativa Fólkaflokkin. Javnaðarflokkurin fekk 34,3 prosent av atkvøðunum í gjár, meðan tann stóri kappingarneytin,Vinstri, fekk 27,5 prosent. Hetta merkir, at Javnaðarflokkurin gjørdist tann stóri sigursharrin við eini framgongd uppá 25%. Umframt teir tríggjar stórbýirnar Keypmannahavn, Århus og Ålborg vann Javnaðarflokkurin eisini Kolding, Horsens, Roskilde, Vejle, Næstved, Viborg og Hillerød. Hetta er sera áhugavert – ikki minst tí Hillerød liggur í konservativu háborgini, Norðursæland.

Hinvegin rakk Javnaðarlokkurin ikki at aðalmálinum, sum var at vinna borgarstjórasessirnar í fýra av teimum størstu býunum í landinum við tað, at flokkurin sum nevnt misti Odense á stokkinum. Hóast tepra úrslitið í Odense er rákið púra klárt: danir eru við at gerast troyttir av Vinstra og tess sera liberalistiska og marknaðarvenda politikki. Danir eru troyttir av egoismuni í politikki. Danir eru troyttir av, at Danmark ongan uttanríkspolitiskan profil hevur, men bert so at siga automatiskt leggur seg í kjalarvørrin á USA. Henda uttanríkispolitiska kósin kann, sum frá líður, gerast sera vandamikil fyri Danmark bæði so og so.

Nú er so spurningruuin, hvørjar avleiðingar kommunuvalið fær fyri danskan politikk. Tað er lítið at ivast í, at forsætisráðharrin, ið er tikin úr leikum sum taktikkari, fer at umhugsa sín politikk og sínar ráðharrasessir. Tað kann væl henda, at vánaliga úrslitið fer at kosta nøkrum ráðharrum høvdið og í hesum høpi er innanríksráðharrin í vanda. Lars Løkke Rasmussen hevur havt høvuðsábyrgdina av valstríðnum og hevur verið stand in fyri Fogh á mestum øllum valfundum í ølum valdømum. Hann hevur eisini lagt valstrategiina, sum miseydnaðist fullkomuliga. Eisini fer Fogh at endurskoða innanríkispolitikkin. Tað er hugsandi, at valúrslitið fer at ávirka Danska Fólkaflokkin, ið helst fer at seta stjórnina undir enn harðari trýst. Javnaðarflokkurin hevur nú fingið góðan byr og úrslitið var ein sigur fyri Ritt og Helle og spennandi verður at síggja, um tær fara at megna at halda ferðini heilt fram til næsta fólkatingsval.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Samhaldsfestið, sum hvarv



**Bill Justinussen**
*løgtingsmaður fyri Miðflokkin*

Samhaldsfestið í landsskattaskipan okkara byggir á, at tey, sum vinna meiri pening, gjalda størri part av inntøkuni í skatti. Soleiðis rindar tann síðst vunna krónan munandi meiri skatt enn tann fyrst vunna. Hetta kallast tann progressivi (vaksandi) skattastigin.

Kommunuskattaskipanin er ikki samhaldsføst á sama hátt. Har rinda øll sama part av inntøkuni, tá sæð verður burtur frá botnfrádráttinum. Um kommunuskatturin er 20%, rindar tann, sum vinnur 100.000 20% og tann, sum vinnur 500.000 20%. Hetta er tann proportionali (javni) skattastigin.

Samhaldsfasti arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin (AMEG) er eisini eitt slag av skatti. Hesin skatturin er proportionalur, tvs. at øll rinda sama prosentgjald uttan mun til inntøku.

Barnsburðargrunnurin er eisini ein skattur. Hesin er somuleiðis proportionalur, tvs. at øll gjalda sama prosentpart inn í grunnin, uttan mun til inntøku.

Arbeiðsloysisskipanin er eisini ein skattur. Hesin er somuleiðis proportionalur, tvs. at øll gjalda sama prosentpart, uttan mun til inntøku.

Almenn gjøld so sum vegskattur, kringvarpsgjald, sjúkrakassi v.m. eru øvugt proportional. Tvs. at tann, sum hevur lága inntøku, má gjalda størri prosentvísan part av síni inntøku, tí gjøldini eru eins fyri høgan og lágan.

**Láglønt verri fyri**

Sostatt er landsskatturin einasti samhaldsfasti skatturin, har tey, sum vinna meiri, gjalda meiri í prosentum. Allir hinir skattirnir ganga hart út yvir tey, sum hava lágar inntøkur og fyri so vítt eisini miðalinntøkur.

Hendan samgongan minkar um samhaldsfasta landsskattin. Hon økir um kommunuskattin, arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, barnsburðargrunnin, vegskattin v.m., sum rakar tey lágløntu harðari. Munurin millum láglønt og háløn økist. Tey tímaløntu eru munandi verri fyri nú enn fyri tveimum árum síðani, og tá hendan samgongan hevur sitið 2 ár afturat, verður tað enn strævnari at vera tímaløntur.

Miðflokkurin er ímóti hesi gongdini. Vit hava alla tíðina víst á, at samhaldsfestið í skattaskipanini minkar og minkar, men tíverri hoyrir samgongan ikki boðskapin – heldur ikki javnaðarflokkurin. "Tað skal loysa seg at arbeiða" er herrópið. Hesum tekur Miðflokkurin undir við, men tað skal ikki ganga út yvir samhaldsfestið í skipanini. Yvirskipaði politikkurin má og skal vera, at øll skulu kunna liva eitt gott lív her og nú og hava umstøður til eina munadygga eftirløn. Í dag er ov stórur munur á fólki. Tíbetur eru tað mong, sum hava góð størv og góðar fíggjarligar umstøður, men tíverri eru tað alt ov mong, sum hava sera trupult við at fáa gerandisdagin at ganga upp orsakað av fíggjarligum byrðum. At javnaðarflokkurin hevur slept stríðnum fyri teimum lágløntu ger so bara uppgávuna hjá okkum øðrum so mikið størri.

# Fyrilestur um motión

Týskvøldið 22. november kl. 19.30 heldur Hedvig Matras fyrilestur á Klaksvíkar bókasavni um rørslu.

Hedvig Matras arbeiðir sum fysioterapeutur á Klaksvíkar sjúkrahúsi og hevur verið á skeiðum um týdningin av at røra seg. Í fyrilestrinum fer hon at tosa um, hví tað er neyðugt at røra seg, hvørjar ágóðar tað gevur, umframt at hon gevur vegleiðing í gagnligum rørslum og venjingum.

Aftan á fyrilesturin verður høvi at seta spurningar. Eisini verður kaffi og køkur at fáa.

**ave**

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.